

## Ósigraðir í sjey dystir

Atli Danielsen og FC Roskilde vunnu aftur í gjár. Hesaferð settu teir uppflytararnar frá Hobro upp á pláss við at vinna 3-0 á heimavølli. Sigurin hevur við sær, at Atli Danielsen og teir hava ikki tapt seinastu sjey umførini, og leikararnir tykjast veruliga at hava funnið stevið. Tað var eisini staðfest við, at FC Roskilde lat ikki nakað mál fara ígjøgnum fyri fyrstu ferð í ár. Klaksvíkingurin, sum heldur steðg frá landsliðsfótbólti orsaka av lesnaðinum, var við í uppspælinum til fyrsta málið og spældi næstan allan dystin, tí hann var skiftur út fimm minuttir fyri leiklok. Við sigrinum hevur FC Roskilde nú 15 stig, sum røkkur til eitt fimta pláss í deildini, sum má metast sum ein sera góð støða, tá FC Roskilde við bit og slit bardi seg undan niðurflyting í fjør. Tað er eisini vert at hefta seg við málúrtøkna hjá Atla og teimum. Í teimum tíggju dystunum higartil, hava teir skotið 19 mál, men latið heili 18 mál fara ígjøgnum. Ein staðfesting av, at liðið hevur brúkt nakað av tíð um at finna stevið.



*Brian Kerr, landsliðsvenjari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Brian Kerr skal hava stig

**A-LANDSLIÐIÐ Foreldruni hjá Brian Kerr eru bæði ættaði úr Norður-Írlandi, og sum smádrongur var hann ofta í landinum. Fleiri av systkinabørnunum eru úr Norður-Írlandi. Tí verður talan um ein serstakan dyst hjá føroyska landsliðsvenjaranum í morgin**

Uni Holm Johannesen

– Tá vit ikki skulu spæla móti Írlandi, var Norður-Írland tað besta, sum kundi henda.

Tað segði Brian Kerr við Sosialin, tá tað var greitt, at Føroyar vóru í sama undanbólki sum norðurírar.

Tí tað verður ein serstakur dystur fyri landsliðsvenjaran í annað kvøld.

Kerr hevur ógvuliga tøtt ættarbond til norðurírska grannalagið, og hann hevur gjørt greitt, at tað hevði verið serstakt fyri hann, um Føroyar fær stig.

### Hevur vakt ans

Fjølmiðlarnir í Norður-írlandi varpa eisini ljós á føroyska landsliðsvenjaran undan dystinum.

At írski Brian Kerr hevur tilknýtið til Norður-Írland er ikki ein fyrimunur á Svangaskarði í morgin, tí hann kennir til bretskan fótbólt.

Hann hevur leingi verið partur av bretsku fótbóltsmentanini, og tí veit føroyski landsliðsvenjaran, hvussu hann skal seta kílar í álopsspælið hjá Norður-Írlandi í annað kvøld.

Stephen Craigan, verjuspælari, staðfestir, at Kerr fer at gera alt fyri at fáa stig.

– Føroyska liðið er væl fyrireikað. Hann veit helst meira um okkara lið og okkara spæliskipan, enn um sítt egna lið. Tað fer at hjálpa teimum. Hann vil vinna móti okkum. Hann vil smílast aftaná. Tað er Írland móti Norður-Írlandi, um tú vil rópa tað so, sigur Stephen Craigan, sum spælir við skotska Motherwell, við Press Associaion.

Verjuspælarin sigur, at Brian Kerr hevur tikið á seg eina stóra uppgávu við at stjórna føroyska landsliðnum.

– Hann er altíð ágrýtin. Tað prógvaði hann sum landsliðsvenjari hjá Írlandi. Kerr vil hava eitt gott úrslit, og vit skulu stríðast fyri at fáa fult, sigur hann.

### Nøkur ivamál

Tað er framvegis ivasamt, um Símun Samuelsen og Jóhan Troest Davidsen verða í føroysku byrjunaruppstillini í morgin.

Hóast skaða, hava teir vant við í vikuskiftinum, men mánamorgunin var ikki endaliga greitt, at Samuelsen og Davidsen spæla við fullari megi í morgin.

Jann Ingi Petersen, sum var smáskaddur undan dystinum móti Slovenia fríggjakvøldið, tykist verður tøkur.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Brian Kerr.

# Føroyar er størri enn Italia



*Venjarin hjá norður írum, Nigel Worthington*

Nigel Worthington, landsliðsvenjari hjá Norður-Írland, sigur við SkySports, at dysturin móti Føroyum er størri enn dysturin móti Italia, sum var fríggjakvøldið.

– Fyri okkum er hesin dysturin størri, tí nú vænta øll, at vit fara at vinna. Føroyar hava ein bretskan venjara, sum kennur bretskan fótbólt. Teir hava vanliga fleiri leikarar aftan fyri bóltin, og teir fara helst at seta kílar í okkara álopsspæl, sigur Nigel Worthington við SkySports News.

Norður-Írland hevur fingið eina góðan byjan upp á EM-undankappingina. Liðið hevur vunnu á útivølli móti Slovenia, og fríggjakvøldið spældu teir málleysan javnleik móti Italia á Winsor Park í Belfast.

– Tað er gleðiligt, at vit í teimum báðum fyrstu dystunum hava hildið nullið. Vit vístu móti Italia, at vit ræðast ikki nakran, sigur Nigel Worthington.

Um Norður-Írland vinnur dystin á Svangaskarði, so eru teir væl fyri í kappingini.

– Dysturin móti Føroyum er ein dystur, sum vit skulu vinna, um vit vilja víðari. Vit hava góðan møguleikan at koma í eina góða støðu týsdagin, sigur landsliðsvenjarin at enda.



**Hópurin hjá Føroyum:**

**Málverjar:**
Jákup Mikkelsen, ÍF
Tórður Thomsen, HB
Gunnar Nielsen, Tranmere Rovers

**Verjuleikarar:**
Egil á Bø, EB/Streymur
Jónas Tór Næs, B36
Jóhan Troest Davidsen, NSÍ
Rógvi Baldvinsson, Álgarð IF
Atli Gregersen, Ross County
Jonhard Frederiksberg, NSÍ
Hendrik Rubeksen, HB

**Miðvallarar:**
Christian Lamhauge Holst, Silkeborg
Fróði Benjaminsen, HB
Bogi Løkin, NSÍ
Jústinus R. Hansen, NSÍ
Daniel Udsen, EB/Streymur
Jann Ingi Petersen, NSÍ
Christian R. Mouritsen, B36
Hjalgrim Elttør, B36
Símun Samuelsen, HB

**Framherjar:**
Jóan Símun Edmundsson, Newcastle
Arnbjørn Hansen, EB/Streymur



**Hópurin hjá Norður-Írlandi:**

**Málverjar:**
Maik Taylor, Birmingham City
Jonathan Tuffey, Inverness CT
Alan Blayney, Linfield

**Verjuleikarar:**
Jonathan Evans, Manchester United
Stephen Craigan, Motherwell
Craig Cathcart, Blackpool
Gareth McAuley, Ipswich Town
Aaron Hughes, Fulham
Chris Baird, Fulham

**Miðvallarar:**
Grant McCann, Peterborough United
Chris Brunt, West Bromwich Albion
Jonny Gorman, Wolverhampton
Corry Evans, Manchester United
Steven Davis, Glasgow Rangers
Niall McGinn, Celtic
Sammy Clingan, Coventry City

**Framherjar:**
David Healy, Sunderland
Warren Feeney, Oldham
Kyle Lafferty, Glasgow Rangers
Pat McCourt, Celtic
Rory Patterson, Plymouth